# Útiskúli

Í útiskúlanum er vanligt, at vit ganga túrar í nærumhvørvinum og í náttúruni í Tórshavn. Viðhvørt taka vit býarbussin annan vegin og til longri túrar báðar vegir. Vit fara túr í øllum veðri. Tó ikki, tá veðrið er so mikið ringt, at tað er ikki forsvarsligt at ganga túr við børnunum. Børnunum plaga at dáma sera væl at vera í útiskúla, tí her læra tey á ein øðrvísi hátt enn vanligt, tí í náttúruni er nógv at sansa hjá børnunum.

Við okkum í útiskúla hava vit ofta kakao, sum vit hita til børnini. Eisini brenna vit bál viðhvørt. Hetta er bæði hugnaligt og stuttligt, og dámar børnunum væl.

Vónandi fer barn tykkara dáma væl at vera í útiskúla.

Við í útiskúla hevur barn tykkara tørv á at hava við:

Ein lítlan ryggsekk, og í honum skal vera:

- Drekkidunkur
- Matpakki
- Einir góðir skógvar at ganga í (um tað er vátt, so er gott við vatntættum skóm)
- Góð og hóskandi yvirklæðir og klæðir til at ganga og røra seg í úti (gott at kanna, hvussu veðrið verður dagin fyri)
- Regnklæðir (um tað er neyðugt tann dagin)
- Skiftiklæðir

**Obs!** T.d. veit man frammanundan, at veðrið verður ordiliga gott, so er kanska ikki neyðugt við regnklæðum. Men.. veit man at barn mítt dámar sera væl at gera seg vátan, so er kanska snilt at geva barninum skiftiklæðir við í ryggsekkin. So týdningarmikið at hugsa um hesi tingini, tí tey sum blíva vát og einki turt hava at skifta á, tey blíva køld.